# Seyðasýning og fjallmannaveitsla



**Leygardagin, 29. oktober, verður stórt tiltak á Eiði við seyðasýning, fjallmannaveitslu og almennum dansi**

HEYST-TILTAK

*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Olaf í Garði, sum er royndur røktingarmaður og ein av stigtakarunum til seyðasýningina, sigur, at hesin dagur, sum røktingarmenninir á Eiði saman við øðrum skipa fyri, er ein sannur hátíðardagur á Eiði.

– Dagurin byrjar klokkan 10 Uppi á Grind, har brundsseyðir verða mátaðir og sýnaðir av óvildugum sýnsmonnum. Í døgurðatímanum verður steðgur, og síðan verður sýningin tikin uppaftur eftir døgurða.

## Sýning og filmur

Sjálv seyðasýningin fer fram í bygninginum hjá Hans Egil og synum Uppi á Grind, samstundis sum kaffi, saft, køkur, pannukøkur og annað verður at fáa á Brandstøðini, sum eisini er Uppi á Grind.

Tað eru konurnar hjá røktingarmonnunum, sum taka sær av hugnanum við leskandi og etandi til tey – væntandi mongu – sum koma niðan á Grind hendan dagin.

Olaf sigur, at á Brandstøðini verða eisini filmir vístir á stórskýggja, sum Kjartan Stakssund hevur tikið upp, og hetta eru serliga filmar um fjallgongu, seyðabýti og annað.

– Kjartan hevur tikið ein hóp av filmum, sum eru rættiliga áhugaverdir, og sum fólki plagar at dáma væl at hyggja at. Fleiri av teimum gomlu, sum eru við á hesum filmum, liggja undir grønu í dag.

## Síðan 1994

Olaf sigur, at skipað hevur verið fyri regluligum seyðasýningum á Eiði síðan 1994, og hetta er eitt tiltak, sum er triðja hvørt ár.

Seyðasýning hevur verið á Eiði fyri ta tíð, men hetta tiltak var dottið niðurfyri, tá ið menn tóku stig til at reisa tað á føtur aftur, og síðan hava sýningarnar aftur verið regluligar – triðja hvørt ár.

– Í fjør høvdu vit eisini seyðasýning, men tá var eingin fjallmannaveitsla og eingin almennur dansur í hesum sambandi, leggur hann aftrat.

Hesaferð verður so bæði seyðasýning, fjallmannaveitsla og almennur dansur, sum verður í EB-húsinum.

## Góður brundsseyður

– Endamálið við seyðasýningunum, har einir 50 brundar úr ymiskum hagapørtum og hjá monnum, sum hava heimaseyð, verða sýnaðir, er at fáa góðan og vakran brundsseyð, sum vit halda hevur stóran týdning fyri seyðahaldið.

Í aðrar mátar, sigur Olaf, at tiltakið á Eiði er av sosialum týdningi, og somuleiðis skapar tað eina ávísa kapping um vakrastu seyðirnar.

Virðislønir verða nevniliga latnar fyri bestu og vakrastu brundarnar, og tað er P/F Inni, sum letur steypini í hesum sambandi.

Olaf sigur, at eingi krøv eru um aldurin á brundsseyðinum, og tí kann talan bæði vera um yngri og eldri brundsseyð.

## Veitsla og dansur

Klokkan 20 hetta kvøldið verður fjallmannaveitsla á Eiði, og tá sessast fjallmenn at eta ræst kjøt og súpan, men her verður eingin sterkur drykkur á borðinum, bert veikt øl.

– Vit vilja, at allir skulu kunna verða við og kenna seg væl, sigur Olaf.

Gamalt er at bjóða einum gestarøðara við til fjallmannaveitsluna, og í ár er tað Bjarni Djurholm, landsstýrismaður í landbúnaðarmálum, sum hevur fingið heiðurin at siga nøkur orð fyri fjallmonnunum.

Seinni um kvøldið verður boðið til almennan dans á Eiði, har Jákup M. Anthoniussen og Heri Ziska Dahl spæla til dans.

– Vit vænta nógv fólk til dansin, sigur Olaf í Garði.

Sýnsmenninir í ár verða Poul Samuelsen, Haldórsvík, Dávur Emiel Hansen, Tjørnuvík, Eddi Joensen, Kollafjørður, Hans Martin Andreassen, Kvívík og Tummas Marni Joensen, Kvívík.

# Almennur evnisdagur um heilsugóðan aldurdóm

EVNISDAGUR

*Tilhaldið í Havn*



Sameindu Tjóðir lýstu árið 1999 at vera ár teirra gomlu. Í hesum sambandi var eisini her á landi gjørt rættiliga nógv burtur úr hesum tiltaki. Endamálið var at skapa betri fatan í samfelagnum fyri teimum avbjóðingum, sum tann vaksandi bólkurin av fólki, ið farin er um pensjónsaldurin, setur bæði til samfelagið og til tey sjálv.

Somuleiðis samtykti sosiala nevnd hjá kommununi í 1996 at seta ein arbeiðsbólk, hvørs arbeiðssetningur var at koma við uppskoti um, hvønn eldrapolitikk kommunan eigur at føra. Og í samband við »Altjóða eldraárið« 1999, kom so »Eldraálitið« hjá Tórshavnar kommunu.

Í oktober 2000 setti landsstýrismaðurin í almannamálum ein arbeiðsbólk at gera eina lýsing og meting av eldraøkinum. Í 2002 kom úrslitið av arbeiðinum. Álit um eldraøkið.

Politiski málsetningurin í álitinum er við grundarlagnum í meginreglunum hjá ST. Høvuðsboðskapurin hjá ST er, at øll lond eiga at stremba eftir einum samfelagi fyri allar aldursbólkar. ST áleggur heimsins stjórnum at taka niðanfyri standandi meginreglur til eftirtektar og gera tær til lógarfestan part av almannapolitikkinum skjótast til ber. Rættur teirra gomlu er í høvuðsheitum: Sjálvbjargni, luttøka, umsorgan, menning og sjálvsvirði.

Hesi seinnu árini er talið á fólkum yvir 65 ár vaksið í stórum, og livitíðin gerst longri og longri. Stundum hoyra vit henda aldursbólk umtalaðan sum eitt vandamál í samfelagnum. Hetta man helst koma av, at útreiðslurnar til eldraøkið eru skjótt vaksandi, tað veri seg til pensjónir, ellis- og røktarheim, sjúkrahúsviðgerð, heimahjálp o.s. fr. Henda myndin gongur aftur í øllum tí framkomna Vesturheiminum.

Tað er væl skiljandi, at tess fleiri røktarkrevjandi fólk, ið verða, tess størri gerast útreiðslurnar fyri samfelagið bæði til røktarheimspláss og til rakstur av heilsuverkinum. Orsøkirnar til, at fólk gerast óhjálpin kunnu vera so mangar. Ein av teimum eru tær sjúkurnar, sum standast av vælferðarliviháttinum.

Tilhaldið í Havn er eitt av teimum støðunum, har roynt verður at gera teimum gomlu ein møguleika fyri at fáa eitt ríkari innihald í gerandisdagin, eftir at tey eru farin út av arbeiðsmarknaðinum. Grundstøðið í arbeiðinum í Tilhaldinum eru meginreglarnar hjá ST. Við meginreglunum hjá ST í huga fór Tilhaldið undir átakið »Ábyrgd fyri egnari heilsu 2004«

Vit heittu á átta fólk, sum í sínum starvi hava serligar førleikar fyri at lýsa hetta evnið hvør úr sínum sjónarhorni. Á henda hátt vóna vit at hava sett eitt orðaskifti í gongd, sum kann vera við til at motivera gomul eins væl og yngri til at umhugsa sín lívshátt og gera sítt til at fáa ein so heilsugóðan aldurdóm sum gjørligt.

Nevndin í Tilhaldinum er á einum máli um, at henda vitanin ikki bert skal koma okkum havnaborgarum tilgóðar. Tí skipar Tilhaldið í Tórsgøtu fyri einum almennum evnisdegi »Ábyrgd fyri egnari heilsu« í Útvarpshøllini leygardagin 29. okt. 2005 kl. 10.30 - 16.30. Sjá skránna í leygardagsbløðunum.

Øll eru hjartaliga vælkomin, sigur Tilhaldið í tíðindaskrivi.

## NemKonto til danskar bankaflytingar

**Frá november 2005 fara øll útgjøld frá almennum stovnum í Danmark so sum SU, pensiónir, barnapeningur og avlopsskattur bert at ver_a útgoldin á konti, sum eru skrásettar sum »NemKonto«**

PENGAMÁL

Sambært »Lov om offentlige betalinger m.v.«, dagfest 27. dec. 2003, skulu øll - sum móttaka gjøld frá almennum stovni í Danmark - vísa á eina konto í peningastovni, hagar almennu myndugleikarnir kunnu flyta peningin, og fær hendan konto heitið »NemKonto«.

»Lov om offentlige betalinger m.v.« er ikki galdandi í Føroyum, men hon hevur tó ávirkan á føroyingar. Føroyingar, sum fáa pensión, SU ella onnur gjøld frá almennum stovni í Danmark, skulu eisini hava eina konto skrásetta sum NemKonto, fyri at fáa uppæddina flutta á konto.

**Hvat er ein NemKonto?**

Ein NemKonto er ein heilt vanlig bankakonto, sum kundin væntandi hevur frammanundan, til dømis ein vanlig lønarkonto í Føroya Banka. Kundin skal bert gera av, hvør konto hann ynskir skal skrásetast sum NemKonto.

Hvør persónur kann bert hava eina NemKonto, og fara øll gjøld frá donskum almennum stovnum til hesa konto.

**Hvussu verður NemKonto skrásett?**

Um ein persónur hevur fingið pening frá almennan stovni í Danmark fyrr, er tað hartil nýtta kontonummar væntandi longu skrásett at vera NemKonto. Um so er, hevur kundin trúliga fingið fráboðan um hetta.

Um kundar ikki hava konto skrásetta, kunnu teir venda sær til sín kundaráðgeva í Føroya Banka, og upplýsa hvør konto skal skrásetast sum NemKonto.

Møguleiki er eisini fyri at skráseta eina NemKonto sjálvur á www.nemkonto.dk men hetta krevur eina talgilda undirskrift.

Føroya Banki kunnar um hetta á heimasíðunum www.foroyabanki.fo og www.kontoin.fo. Meira fæst eisini at vita á www.nemkonto.dk.